# HB gjørt sáttmála við tveir danir

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

Á tíðindafundinum týsdagin, kunngjørdi formaðurin í Havnar Fótbólti, Steinfinnur Mittelstein, at HB hevur gjørt eitt-ára sáttamála við verjuleikaran Martin Christensen og áleyparan Carsten From.

Tað hava leingi verið gitingar um, at HB skuldi fáa útlendskar leikarar til felagið í ár, og týsdagin vóru hesar gitingar váttaðar.

Carsten From kemur úr Superliga liðnum FC Midtjylland, har hann hevur verið fulltíðarleikari burturav. Hann hevur verið knýttur FC Midtjyllandi í tvey ár, og tilsamans er tað blivið til 10 dystir á besta liðnum. Hann er 23 ára gamal.

Martin Christensen hevur seinasta hálv árið leikt fyri Kalundborg í donsku 2. deild. Hann hevur áður roynt seg í Holbæk, Glostrup og Kalundborg. Martin Christensen er 26 ára gamal.




*Á tíðindafundið í HB-húsinum týsdagin, kunngjørdi formaðurin í Havnar Fótbólti, at sáttmálið er gjørdur við danarnir Carsten From og Martin Christensen.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Brøndby møtir Sønderjylland

**Sunnudagin gongur leiðin hjá donsku meistarunum til Turkalands á venjingarlegu**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*

Felagið hjá Jón Róa Jacobsen, Brøndby, møtir fríggjadagin HFK Sønderjylland. Dysturin verður helst á graslíkisvøllinum hjá Brøndby, og væntandi verður Jón Rói millum Brøndby-leikararnar á vøllinum.

### Nummar 24

Av tí, at fleiri av leikarar eru farnir úr Brøndby í vetrarsteðginum, hava leikararnir í Brøndby fingið nýggj leikaranummar. Á heimasíðuni hjá Brøndby standa leikaranummarini hjá 1. liðs hópinum, og við nummar 24 stendur navnið hjá Jón Róa. Fyrrverandi HB-leikarin hevur tí longu vunni sær pláss á 1. liði hjá meistaraliðnum.

### Til Turkalands

Eftir dystin ímóti HFK Sønderjylland fríggjadagin, gongur leiðin hjá Brøndby til Turkalands á venjingarlegu. Enn er ikki vist, hvørjir leikarar skulu við. Jón Rói er partur av 1. liðshópinum hjá Brøndby, og tí er rættiliga sannlíkt, at hann skal við Turkalands. Hetta fer at hava við sær, at føroyski verjuleikarin ikki verður tøkur hjá Henriki Larsen til venjingarleguna í Spania.

Nýggi HB-leikarin, Carsten From:

# -Evropa Cup dregur

**Eg kundi tikið av onkrum tilboði frá 1. deildar feløgum í Danmark, men eg havi hug at royna nakað nýtt, sigur nýggi HB-framherjin Carsten From**

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

- Eg havi leikt tveir UEFA-Cup dystir fyri FC Midtjylland, og tað var nakað heilt serligt, og tí er luttøkan í Champions League hjá HB, ein av orsøkunum, eg havi valt at gera sáttmála við HB fyri komandi kappingarárár, segði Carsten From eftir tíðindafundin týsdagin.

Nýggi HB-leikarin vísti á, at um hann hevði fingið sama tilboð frá grannunum í B36, hevði hann ikki tikið av, tí B36 luttekur ikki í evropeiskum fótbólti í ár.

Carsten From hevði tilboð frá fleiri 1.deildar feløgunum í Danmark, men valdi kortini at gera sáttmála við HB. - Eg havi hug at royna okkurt nýtt, og tá tað vísti seg at HB kom við einum tilboði, valdi eg at taka av, greiðir Carsten From frá.

Ætlanin er, at nýggi HB-framherjin, umframt at spæla fótbólt, eisini skal arbeiða. Gentan hjá Carsten From kemur eisini til Føroya at búgva, og tey skulu búleikast í Føroyum næsta árið.

Hann sigur seg gleða seg til kappingarárið og til tilveruna í Føroyum.

- Nú kenni eg av góðum grundum ikki støðið í Føroyum, og eg havi latið mær fortalt, at HB hevur mist fleiri lykla-leikarar frá meistaraliðnum í fjør, men kortini havi eg góðar vónir til at vit fara at standa okkum væl í ár, sigur nýggi HB-áleyparin at enda.



*Nýggi HB-framherjin, sigur seg hava hug at royna ein nýggja eina aðra fótbóltstilveru, enn í Danmark, og tí hevur hann gjørt sáttmála við HB.*
*Mynd: Jens Kristian Vanga*



# Johan Byrial og Ingi feskastu nøvnini

**Fleri nýggj nøvn eru at síggja í hópinum hjá Henrik Larsen, sum fer til Spania 14.februar**

LANDSLIÐIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Føroyska landsliðið er úttikið til venjingarleguna á Malaga seinni í hesum mánaðinum. Fleiri nýggj nøvn er at síggja, og nøkur gomul nøvn eru við aftur. Bárður Johannesen, Jann Ingi Petersen, Bárður Mortansson og Inga Højsted eru fyri fyrstu ferð við í landsliðshøpi.

### Byrial við aftur

Nakað óvæntað hevur Henrik Larsen sent boð eftir Johan Byrial Hansen aftur. Hann hevur ikki verið á landsliðinum, síðan landsliðsvenjarin Henrik Larsen tók við venjarastarvinum í fjør. Johan Byrial spælur í Horsens, og har leika teir 4-4-2, og tí verður høvið hjá landsliðsvenjaranum at síggja Johan Byrial á føroysku landsliðnum við somu spæliskipan í Malaga.

Umframt Johan Byrial, eru boð eisini send eftir GÍ-leikaranum, Súna Olsen, sum var fastur maður í hópinum hjá Allani Simonsen, men ikki hevur við á landsliðnum hjá Henrik Larsen.

### Ungir leikarar við

Í síðstu viku boðaði hjálparvenjarin, Jógvan Martin Olsen, frá, at tveir ungir leikarar skuldu við vissu við á ferðina til Spania. Valið fall á Jann Inga Petersen úr B68 og Inga Højsted úr enska meistarafelagnum Arsenal. Jann Ingi Petersen hevur verið á øllum ungdómslandsliðum hjá Føroyum, og hann var tann spælarin, ið markeraði seg best á U-19 landsliðnum í fjør, og tí er úttøkan av honum ikki heilt óvæntað.

17 ára gamli Arsenal leikarin, Ingi Højsted, hevur eisini roynt seg á ungdómslandsliðunum. Hann hevur verið plágaður nógv av skaðum, síðan hann fór til Onglands, men seinastu tíðina hevur hann verið skaðafríður. Ingi Højsted er yngsti leikari nakrantíð at vera úttikin á føroyska landsliðið.

### Arbeiðið argar

Hjá Helga Petersen og Hans Fróða Hansen liggur ikki fyri at fara til Spania. Báðir eru upptiknir av arbeiði, og tí vera teir ikki við á ferðini.

KÍ-málverjin, Meinhard Joensen, hevur seinastu mánaðirnar verið roknaður sum triði málmaður á landsliðnum, og tí var væntandi at hann skuldi við til Spania, nú ikki bar til hjá Jákupi Mikkelsen. Meinhard hevur ikki luttikið á landsliðsvenjingunum seinastu vikuskiftini vegna skaða í rygginum, og tí bar eisini honum undan at vera við á venjingarleguni í Spania

### Ingi kann gerast yngsti leikarin

Verður talan um at nakran landsdyst niðri í Malaga, so verður Ingi Højsted-leikarin yngsti føroyski landsliðsleikari nakrantíð. Tað hevur verið tutlað í krókunum um, at føroyingar møguliga fara at møta Luksemburg í Spania, men enn so bara dysturin ímóti Bryne avtalaður. Møta føroyingar Luksemburg, og Arsenal- leikarin kemur á vøllin, brýtur Ingi Højsted metið hjá Jón Róa Jacobsen, sum yngsti leikarin nakrantíð í føroysku landsliðs-troygguni.



*Nú er greitt, at Ingi Højsted verður við á venjingarleguni í Spania. Verður talan um nakran landsdyst á ferðini, verður Arsenal-leikarin við sínum 17-árum yngsti føroyski landsliðsleikarin nakrantíð.*
*Mynd: Heri á Rógvu*

**Landliðið til Spania:** Bárður Johannesen, Rógvi Jacobsen, Andrew av Fløtum HB, Johannus Joensen FS Vágar, Fróði Benjaminsen, Jann Ingi Petersen B68, Jens Kristian Hansen, Pól Thorsteinsson, Julian Johnsson, Heðin á Lakjuni, Jákup á Borg, Bárður Mortansson, John Petersen B36, Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør KÍ, Jens Martin Knudsen NSÍ, Óli Johannesen TB, Suni Olsen GÍ, Johan Byrial Hansen Horsens og Ingi Højsted Arsenal

# Spennandi endaumfør í 1.deild

**Umframt sunnudag, so verða væntandi nakrir dystir leiktir leygardag og mánadag í ár.**

LEIKSKÁ
*Páll Holm Johannesen*

Fótbóltsfeløgini kring landið hava nú fingið fyrsta útkastið frá kappingarnevndini í FSF um leikskrá fyri komandi kappingarár. Ávís misnøgd var í fjør um at ov fáir spennandi dystir vóru síðstu leikumførini. Á fyribils útkastinum sær út sum kappingarnevndin hevur tikið hesa misnøgdina til sín.

Næst seinasta leikumfar standa HB og B36 til at bresta ímóti hvørjum øðrum; meðan KÍ fær vitjan av silvurvinnarunum úr Runavík. Seinasta leikumfar fær HB vitjan av KÍ, meðan B36 skal til Gøtu, so væntast kann ein spennandi endaspurtur í landskappingini hjá monnum í ár.

### Mána- og leygardagsdystir

Í landskappingini í 1. deild í ár verða ikki allir dystir leiktir sunnudag. Í fyribils skránni frá FSF verður lagt upp til, at nakrir dystir verða avgreiddir leygardag og mánadag. Eysturoyarliðini vístu á í fjør, at torført var at savna áskoðarar úr allari Eysturoynni til dystirnar, tí fleiri Eysturoyarlið spældu samstundis. Tey setti tí eitt ynski fram um, at nakrir 1.deildar dystur vórðu fluttir.

Hesum ynski, tykist FSF, hava gingið Eysturoyarliðunum á møti, tí í skránni eru nakrir dystir lagdir antin til mánadag ella leygardag.



*Lagt er upp til spennandi endaspurt í landskappingini í ár. Stórdystur verður í Havn seinasta leikumfar, tá HB fær vitjan av Kí.*
*Mynd Savnsmynd*

**1. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 16/05/03 | HB | FSV |
| 15/05/03 | GÍ | KÍ |
| 16/05/03 | VB | B36 |
| 16/05/03 | EB/ST | B68 |

**2. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 26/05/03 | NSÍ | HB |
| 25/05/03 | B36 | EB/ST |
| 25/05/03 | KÍ | VB |
| 25/05/03 | FSV | GÍ |
| 25/05/03 | SKÁLA | B68 |

**17. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 28/09/03 | EB/ST | VB |
| 28/09/03 | B68 | GÍ |
| 28/09/03 | B36 | HB |
| 28/09/03 | KÍ | NSÍ |
| 28/09/03 | FSV | SKÁLA |

**18. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 05/10/03 | NSÍ | FSV |
| 05/10/03 | HB | KÍ |
| 05/10/03 | GÍ | B36 |
| 05/10/03 | VB | B68 |
| 05/10/03 | SKÁLA | EB/ST |